Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Frimodt Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Vegurin til Múla

Spurningar:

1. Eru ætlanir um at halda fram við arbeiðinum at gera ábøtur á vegin til Múla?
2. Um slíkar ætlanir eru, nær kann so roknast við, at næsta stigið í hesum arbeiðinum verður tikið?
3. Nær kann roknast við, at vegurin verður endaliga dagførdur?

Viðmerkingar:

Á fíggjarlógini fyri árið í ár eru játtaðar 500.000 krónur til at gera ábøtur á vegin til Múla. Vegurin er í ringum standi og hevur tørv á, at ábøtur verða gjørdar á hann.

Nakað av viðlíkahaldsarbeiði er gjørt í ár, men enn er tó nógv eftir at gera. Tí verður spurt, hvørjar ætlanir eru um framhald av hesum arbeiði.

Á Løgtingi, 16. september 2021

Frimodt Rasmussen